## Bali-bumbumaðurin deyður

Myndugleikarnir í Indonesia siga, at maðurin, sum legði bumbuatsóknina á indonesisku frítíðaroynni Bali til rættis í 2002, hevur latið lív í einum átaki hjá løgregluni. Indonesisku myndugleikarnir hava leitað leingi eftir manninum, sum æt Dulmatin, og sum var ein av leiðarunum í yvirgangsfelagsskapinum Jemaah Islamiyah. USA hevði lovað 10 milliónir dollarar í finningarløn, um onkur vildi avdúka, hvar hann fjaldi seg. 202 fólk doyðu í bumbuatsóknini á Bali. Teirra millum vóru tríggir danir.



## Kvinna ætlaði yvirgang

Í USA hava myndugleikarnir tikið eina kvinnu og skuldsett hana fyri at hava havt ætlanir um at skipa fyri yvirgangi í Evropa og Suðurasia. Kvinnan, sum amerikonsku myndugleikarnir kalla „Jihad Jane“, er millum annað skuldsett fyri at hava havt ætlanir um at myrða ein svenskan ríkisborgara. Einki verður sagt um, hvør sviin er, men sjónvarpið CNN sigur frá einum embætismanni, at „Jihad Jane“ ætlaði sær at beina fyri blaðteknaranum Lars Vilks, sum teknaði eina umstrídda tekning av Muhammed profeti fyri trimum árum síðani.

# að uttan arbeiðspláss



*- Skal bygdin vaksa aftur, mugu arbeiðspláss skapast. Tað var meiri lív í, tá nógv arbeiði var á flakavirkinum, sigur sigur Elsa Andreasen úr Haldórsvík*

Mynd: Jens Kristian Vang

> *Tað er okkara uppgáva, sum bygdaráðslimir at skapa umstøður hjá fólki at kunna seta búgv. Og ikki minst at skapa okkurt á staðnum, um møguleiki eru fyri tí*



*Tað eru fleiri fólk sum gjarna vilja búseta seg í Haldórsvík. - Onkur hevði keypt grundøki her, men seldi so aftur, tí tey sóu aðrar møguleikar í øðrum bygdum, sigur Elsa Andreasen, bygdaráðslimur í Sunda kommunu*

Mynd: Jens Kristian Vang

flyta suður á Norðskála, so eru tey munandi tættari við allar tær tænasturnar sum fólk seta í dag.

Har er stórur skúli, stórur barnagarður og ikki minst møguleikar at fara til handils at keypa matvørur, klæðir og annað.

Fyri tey fótbóltshugaðu er somuleiðis munandi styttri vegur at fara haðani til venjing ella dyst á vøllinum við Margáir í Streymnesi, enn úr Haldórsvík.

- Og tað er sjálvandi eisini betri at sleppa undan at koyra allar hesar túrarnar norður higar á vetrartíð, slær Elsa fast.

> *Eg haldi eisini, at vit ungu halda tað vera finasta slag at búgva her. Tað er so eingin forðing fyri nøkrum, hóast fleiri møguleikar og tilboð eru aðrastaðni*

**Skúlin dregur**

Hóast víkafólk hava sæð og staðfest, hvussu fólk flyta av bygdini, eru kortini nøkur ungfólk eftir enn, sum ikki hava stovnað familju.

- Tað vísir seg, at fólk flyta hagar sum tilboðini eru. Og tað er sjálvandi sera harmiligt, tá fólkatalið soleiðis minkar í heimbygdini. Men hinvegin, so skilji eg væl at tey ungu flyta aðrar staðir.

- Vit hava ein góðan skúla her í bygdini, men sum gongdin er og sum útmeldingarnar í løtuni eru frá politiskari síðu, er tað nokk bara ein spurningur um tíð, hvussu leingi vit sleppa at varðveita okkara skúla, sigur hon eitt sindur hørm á málinum.

Tað er tó eitt samstarv á millum tær báðar grannakommunurnar, Eiðis kommunu og Sunda kommunu um samanlegging av skúlunum.

- Fyri meg er kortini eingin ivi um, at um ein hevur ein skúla í bygdini, so dregur hann fólk til sín.